# Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Faroe Employers' Association**

Innlendismálaráðið
Postboks 159
110 TÓRSHAVN

Att.: Anni á Hædd

Tórshavn 9. februar 2009

Okkara tilv./Our ref.:
1372-2440/Marit/Innlen-FAG-B-H
Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar viðv. kunngerð um gjøld.....

Seinastu mánaðirnar hava fleiri lógaruppskot verið løgd fram á Løgtingið og nú kunngerðir til hoyringar har gjøld av ymiskum slagið verða áløgd vinnuni. Av lógum kunnu nevnast:

- Havumhvørvislógin
- Alilógin
- Loyvisumsiting skeinkiloyvir
- Matvørulógin

Rakstrarkunngerðin hevur júst verið til hoyringar og har eru somuleiðis ásetingar um gjøld.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at seinastu tíðina er broyting komin í politikkin viðv. gjøldum, sum vinnan skal gjalda. Tí hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag heitt á Vinnumálaráðið um at taka málið viðv. gjøldum á vinnuna upp til viðgerðar saman við okkum. Dømi eru um, at einstakar fyritøkur gjalda væl omanfyri 500.000 kr um árið í almennum gjøldum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vil tí heita á Innlendismálaráðið um at steðga við hesi kunngerð til, vit eru komin áleiðis við viðgerðini av tí yvirskipaða í hesum málinum.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Marita Rasmussen